## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av norði og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 7 til 10 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi, seinnapartin minni vindur. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Fleyr til gul av norði og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 7 og 10 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi, týsdagin lot av ymsum ættum. Sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 7 og 11 stig.

# Suðuroyar Sparikassi nýggjan bygning í Vági

**Suðuroyar Sparikassi hevur ætlanir um at byggja nýggjan bygning í Vági. Ætlanir hava verið um at byggja sonevndan grønan bygning, men enn eru ætlanirnar ikki endaligar**



*Soleiðis fer nýggi sparikassin í Suðuroy væntandi at síggja út*

**BYGGING**
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Á aðalfundi fyrr í ár kunnaði nevndin um ætlanir hjá Suðuroyar Sparikassa um at byggja nýggjan bygning.

Uppskot varð víst fram, har talan er um sonevndan grønan bygning, har møguleikar fyri alternativum orkukeldum skulu kannast. Men tá var ikki víst víðvíkjandi prísi og øðrum, og síðani aðalfundin í apríl eru sjálvandi nógv hent í málinum, og møguleikin er til staðar fyri, at slík ætlan er kostnaðarmikil.

- Í løtuni verða metingar gjørdar, og vísir tað seg, at slík ætlan er kostnaðarmikil, so má onnur ætlan gerast. Vit arbeiða tí við tveimum tekningum í løtuni, sigur Søren L. Bruhn, stjóri.

- Enn er onki endaligt í byggimálinum, annað enn, at arbeitt verður útfrá tekningunum, sumAlbert Isfeldt hevur teknað, sigur Sørn L. Bruhn.

Bygningurin verður við vissu í Vági, og ætlandi beint vestanfyri núverðandi sparikassabygningin. Tað vil siga millum Suðuroyar Sparikassa og Heilsumiðstøðina.

Talan er í øllum førum um bygning í nýmótans stíli. Bygningurin á tekningini, ið enn liggur á borðinum, er 800 fermetrar og í trimum hæddum, har ovasta hæddin tó er hálv. Ætlanir hava verið frammi um at hava bygningin lidnan í 2010.



**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | 15 |
| Nuuk | 3 |
| Qaqortoq | 2 |
| Ammassalik | 9 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 12 |
| Seyðisfjørður | 8 |
| Tórshavn | 13 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 23 |
| London | 24 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 15 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 21 |
| Keypmannah. | 21 |
| Helsinki | 12 |
| Moskva | 10 |
| Berlin | 27 |
| Warzawa | 28 |
| Kiev | 25 |
| Bukarest | 24 |
| Paris | 26 |
| Madrid | 13 |
| Róm | 22 |
| Malorca | 21 |
| Athen | 25 |
| Malta | 25 |
| Tunis | 25 |
| Beijing | 29 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 16 |
| New York | 35 |
| Miami | 28 |
| Los Angeles | 19 |
| Meksikobýur | 19 |
| Panama | -- |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 10 |

## LUFTTRÝSTIÐ



**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 992 hPa. við Hebridurnar fer í landnyrðing og dýpist. Brúgvalagið til Føroya fer spakuliga eystureftir.



**Í dag:**
Lágtrýstið skamt eystan fyri Hetland fer spakuliga í landnyrðing og gevur framvegis høgætt á okkara leiðum.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 09/06 kl. 06[00] – 10/06 06[00]. Hitin í gjár: 10,7°
Minsti hiti máldur í juni: -9,9° - Mesti hiti máldur í juni: 18,3°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 2,0 mm – mált frá 09/06 kl. 06[00] – 10/06 06[00].
Avfallið higartil í juni: 21 mm




I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

## VESTFALLSKYRRINDI

16.juni Mánin longst frá jørðini
18.juni Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 19. juni | 7:59 | 20:22 | 6:59 | 19:22 | 7:14 | 19:37 | 9:59 | 22:22 | 10:59 | 23:22 | 6:14 | 18:37 | 5:14 | 17:37 | 8:14 | 20:37 | 9:14 | 21:37 | 7:44 | 20:07 | 8:59 | 21:22 |
| 20. juni | 8:46 | 21:08 | 7:46 | 20:08 | 8:01 | 20:23 | 10:46 | 23:08 | 11:46 | - | 7:01 | 19:23 | 6:01 | 18:23 | 9:01 | 21:23 | 10:01 | 22:23 | 8:31 | 20:53 | 9:46 | 22:08 |
| 21. juni | 9:30 | 21:50 | 8:30 | 20:50 | 8:45 | 21:05 | 11:30 | 23:50 | 0:08 | 12:30 | 7:45 | 20:05 | 6:45 | 19:05 | 9:45 | 22:05 | 10:45 | 23:05 | 9:15 | 21:35 | 10:30 | 22:50 |
| 22. juni | 10:11 | 22:31 | 9:11 | 21:31 | 9:26 | 21:46 | - | 12:11 | 0:50 | 13:11 | 8:26 | 20:46 | 7:26 | 19:46 | 10:26 | 22:46 | 11:26 | 23:46 | 9:56 | 22:16 | 11:11 | 23:31 |
| 23. juni | 10:51 | 23:10 | 9:51 | 22:10 | 10:06 | 22:25 | 0:31 | 12:51 | 1:31 | 13:51 | 9:06 | 21:25 | 8:06 | 20:25 | 11:06 | 23:25 | - | 12:06 | 10:36 | 22:55 | 11:51 | - |